## Svínabøndur gevast

Fleiri og fleiri danskir svínabøndur velja at gevast. Fráfalllið hevur ongantíð verið so stórt sum í fjør, soleiðis at seinasta ársskiftið vóru svínabøndurnir 20 prosemt færri í tali enn eitt ár frammanundan, skrivar JydskeVestkysten. Jørgen Gram hjá Syddansk Svinerådgivning sigur við blaðið, at fráfallið í fjør var óvanliga stórt, men hinvegin ikki óvæntað. Hann vísir á, at í 2013 koma nýggjar reglur sum svínagarðar, og tær krevja, at nógv av verandi fjósum mugu umbyggjast. Nógvir bøndur halda ikki, at tað er ein íløga, sum fer at geva tað neyðuga avkastið, og tí velja teir heldur at gevast nú, sigur Jørgen Gram.

## Fiskivinnublað má spara

Norska fiskivinnublaðið FiskeribladetFiskaren kennir nú sviðan av fíggjarkreppuni og hevur gjørt av at skarva fimm milliónir norskar krónur av rakstrarútreiðslunum í ár. Nils Torsvik, ábyrgdarblaðstjóri, sigur við NTB, at inntøkurnar hava verið minkandi. Serliga lýsararnir eru vorðnir meiri varnir, og tá lýsingarnar hava stóran týdning fyri raksturin, merkist hetta beinanvegin. Blaðstjórnin sigur, at tað slepst ikki undan uppsagnum, men enn dugir hann ikki at siga, hvussu nógvar tær verða. NTB skrivar, at øll tey stóru norsku bløðini hava kent sviðan av fækkandi lýsingum.

# svøru úr slógvi



*Faroe Marine Products, vanliga nevnt høvdavirkið, tekur ímóti umleið 10.000 tonsum av slógvi um árið*

á Húsamørk.

Tað er eisini ein prísmunur á teirri rávøru, sum kemur inn á høvdavirkið, antin talan er um høvd og ryggir frá toski ella frá upsa, til dømis. Og tað er eisini munur á, tá vøran verður seld av høvdavirkinum aftur.

Á FMP taka teir ímóti flestu fiskasløgum, burtursæð frá teimum feitu sløgunum, so sum kalva, steinbíti og kongafiski.

– Tað ber ikki til at turka fiti, tí tað vil treingja inn í fiskin so hvørt hann verður turkaður. So tað er ein framleiðsla, sum vit heilt einfalt ikki kunnu framleiða. So vit turka frá øllum fiskasløgum uttan teimum feitu, sigur Eirikur á Húsamørk.

### Hava bygt út

Høvdavirkið framleiðir 10.000 tons av høvdum og ryggjum um árið, og meginparturin fer til Nigeria. Men hvat brúka so nigerianarar tey turkaðu føroysku toskarhøvdini til?

– Teir brúka tey í teirri traditionellu súpanini, sum verður kallað ugusi-suppa. Og tað er tann ræsti smakkurin, sum teimum dámar so væl. Øll hini kryddaríini hava teir nóg mikið av, so teir mugu fáa tann ræsta smakkin aðrastaðni frá, og tað fáa teir so úr Føroyum. Nakað fáa teir eisini úr Íslandi og nakað úr Noregi, sigur Eirikur á Húsamørk.

Turkaðu høvdini og ryggirnir verða pakkaðir í hessian sekkir og so fluttir til Nigeria. Tað skulu vera góð 30 kilo í hvørjum sekki, sum síðani verða fyltir í eina bingju. So sølan fer fram í bingjum.

Høvdavirkið hevur sum nevnt tikið móti áleið 10.000 tonsum av rávøru um árið, og teir hava eisini megnað at havt svørt tøl á botnlinjuni seinastu árini, og tað eru teir sera væl nøgdir við.

Og virkið skapar eisini eina rúgvu av arbeiðsplássum.

– Vit hava millum 50 og 60 ársverk her á virkinum, sigur Erikur á Húsamørk.

Hann sigur, at teir merkja sera væl, tá útsving eru í fiskiskapinum, og tað er eisini tí, at teir hava gjørt eina stóra útbygging í seinastuni.

– Tað hevur verið soleiðis, at virkið hevur verið í minna lagi, tá nógv hevur verið at gjørt, og tá lítið hevur verið at gjørt, hevur virkið verið nógv for stórt. Við hesari útbyggingini vænta vit, at kunnu byrja upp fyri teimum stóru útsvingunum, eisini við teirri nýggju avtaluni, sum vit hava gjørt við teir í Klaksvík við svartkjaftinum, sigur Eirikur á Húsamørk.

### Bjørt framtíð

Stjórin á Faroe Marine Products sær eisini rættiliga ljóst upp á framtíðina.

– Ja, vit síggja ljóst upp á framtíðina. Tað nyttar jú einki at vera svartskygdur, so vit royna bara at taka allar møguleikar, sum eru, sigur Eirikur á Húsamørk.

Hann sigur, at teir higartil hava verið rímiliga einsamallir á marknaðinum, og at kappingin ikki hevur verið hin stóra.

– Nú er so eitt virki aftrat byrja við hesari framleiðsluni, so nú fáa vit at síggja. Tað er jú altíð sunt við kapping, og vit ætla at halda fram við at arbeiða soleiðis, sum vit altíð hava gjørt. Vit vóna, at vit klára at bjóða somu góðu tænastu, sum vit altíð hava gjørt, sigur Eirikur á Húsamørk.

Hann heldur ikki, at Føroyar eru ein so stór fiskivinnutjóð í altjóða høpi.

– Upprunaliga ætlaðu vit bert at gera eitt virki, sum kundi framleiða hesi 6.000 tonsini, men tá Havsbrún gavst við at taka móti slógvi, máttu vit gera eina heildarloysn, og tískil hava vit gjørt stórar íløgur í nýggjar maskinur. So virkið er nú so væl útbygt, at vit kunnu taka ímóti øllum slógvinum í Føroyum, og tað var eisini meiningin við útbyggingini, sigur Eirikur á Húsamørk.

So í løtuni er støðan so, at virkið er ógvuliga passaligt, tá nógvur fiskur er, og nógv for stórt, tá fiskiskapurin er lakur.

– Vit hava bygt okkara virki út til at kunna taka ímóti øllum tí slógvi, sum kemur upp á land í Føroyum. Tað hevur verið av stórum týdningi at kunna tað, og tað er eisini tí, at vit hava útbygt virkið soleiðis. So vit kundu tikið móti øllum tí, sum kemur upp á land, sigur Eirikur á Húsamørk.

Hann sigur, at fáa teir ikki alla rávøruna, sum kemur upp á land, so mugu teir hugsa um onnur bein at standa á.

– Og tað gera vit eisini, sigur Eirikur á Húsamørk, stjóri á Faroe Marine Products.



*Høvd og ryggir verða turkað í teldustýrdum klivum, sum gera tað møguligt at turka nærum hvatsumhelst*



*Skiljingin fer í stóran mun fram úti á flakavirkjunum, haðani FMP keypir sína rávøru*



*Tað arbeiða um 60 fólk á virkinum, sum er ógvuliga framkomið*